tíðindablaðið

# sosialurin

Nr. 112 Fríggjadagur 16. juni 1995 69. árgangur Krónur 7,00

**ALTJÓÐA LUTTØKAN KASTAR FITT AV PENGUM AV SÆR:**

# Fótbóltsmilliónir á veg til Føroya

*Tilsamans eru umleið 2,7 milliónir krónur á veg til Føroya í sambandi við europeisku luttøkuna hjá GÍ, B71 og HB í fjør. GÍ fær mest burturúr – eina góða millión – men eisini Fótbóltssamband Føroya fær eina lítla millión burturav frá UEFA*

**Lesið á síðu 17**



# Fyrstu pisurnar floygdar

**Lesið á baksíðuni**

**LØGMAÐUR OG ARNE NØRREVANG SAMDIR Í MÁLINUM UM SHELL-PALLIN:**

# FØROYINGAR EIGA AT MÓTMÆLA

**Lesið á síðu 4 & 5**

**LØGMAÐUR SERA AV-GJØRDUR VIÐ BRETAR:**

# Fingrarnar frá landsynningshorninum

**Lesið á síðu 6**

# Gamla støðin í Mjørkadali tikin niður



*Gomlu skermarnir, ið vóru hentir undir kalda krígnum, verða sagaðir sundur. Teir eru úr jarni og verða sendir niður til smeltingar*

**Lesið á síðu 10**

*Formaðurin í danska fólkatinginum:*

# – Tit vinna á kreppuni

**Lesið samrøðu á síðu 8 & 9**



*Avgjørdur løgmaður um bretsku marknakrøvini:*

# Vit sleppa ikki landssynnings-horninum !

*-Tað er eingin loyna, at tað er serliga landssynningshornið á tí føroyska landgrunninum, sum bretar hava størstan áhuga fyri og gera krav upp á undir samráðingunum. Men tað vilja vit undir ongum umstøðum sleppa sigur Edmund Joensen, løgmaður við Sosialin, nú enn eitt samráðinarumfar um markið er av.*

Vit spurdu løgmann, um tað er so, at bretar í sínum útspæli á fundunum í Havn í vikuni hava førkað seg ov lítið frá uppruna kravinum, til at føroyingar kunnu góðtaka eina semju'

-Vit hava frá byrjan av hildið okkum hava verið rættiliga realistiskar í tí upprunaliga markinum. Báðir partar høvdu framm-anundnan eitt sjómark við ein gráari sonu ímillum. Men stóru linjurnar var semja um. Ein skuldi tí hugsað sær, at økið, sum henda samráðing snúði seg um var tað gráa økið, sum lá ímillum.

Løgmaður heldur, at tey upprunaligu krøvini, ið bretar løgdu út við og sum øll kenna, nevniliga eitt mark tætt suður úr Munkinum í Suðuroynni, var eitt sera keðiligt útgangsstøði.

-Tað, sum vit so frá føroyskari síðu hava royndt, er at sannføra bretar um tað sera órímuliga í hesum krøvum teirra og royna at fáa teir at hugsa sum góðir grannar, har miðlinjan er mark, og tí hana vit skulu halda okkum til.

### Lættari um fiskimark og undirgrundarmark eru tað sama

*-Nú hava okkara samráðingarfólk sagt, at tað er rímuligt, at fiskimark og undirgrundarmark eru eitt og tað sama. Hvat sigur tú til hetta'*

Út frá einum praktiskum sjónarmiði hevði tað verið best og ruddiligast fyri báðar partar, at fiskimark og undirgrundarmark fylgdust, men tað er eisini rætt, at hesi nýtast ikki at vera tað sama.

Men lættari hevði verið at hildið skil á, um so var.

*Hevur landsstýrið gjørt sær nakrar tankar um, hvat eitt úrslit av einum Haag dómi kundi verið og um tað kanska kundi verði uppaftur verri enn tað útspælið, sum bretar eru komnir við?*

-Tá tú ert í eini slíkari samráðingarstøðu, so mást tú rokna við, at báðir partar hava í huganum, hvat ein dómur kann enda við, og út frá hesum verður tað so eisini samráðst. Men sum góðir grannar, so vita vit, hvar miðlinjan eigur at vera og tað skuldi ikki volt teir stóru trupulleikarnar at mált seg til ta røttu miðlinjuna, um vilji var til tess.

### Ikki bangnir at fara til Haag

*-Men er tú bangin fyri, at eitt úrslit í Haag kann gerast verri fyri okkum enn eitt samráðingarúrslit?*

Nei. Føroyingar eru ikki bangnir fyri at fara til dómstólin í Haag. Vit halda okkum hava eina góða sak, men vit eru eitt sindur vónsviknir av, at slíkir góðir grannar sum Føroyar og Bretland eru, skulu noyðast til at ganga ta tungu leiðina til Haag, tí vita, at hetta tekur eini 5 ár.

Ístaðin fyri at fáa smidligar loysnir, har vit semjast um nøkur viðurskifti, fáa vit tá nakrar dikteraðar linjur, sum vit ikki kunnu samráðast um.

Nú veit eg væl, at bretar siga, at gott hegn gevur góðar grannar, men heilt góðir grannar áttu eisini at kunnað gjørt semjur um okkurt felagsøki teir kunnu hava til beitu.

-Uttan hegn?

-Uttan ov høgt hegn.

Løgmaður vísir á, at tað í hesum føri serliga er talan um landgrunnsmarkið millum londini. Talan er so eisini um at fáa eina semju um stóru økini sunnan fyri, eitt nú Rockallhaslættan. Tað má koma í einum seinni umfari.

Vit spurdu løgmann, nú tað vísir seg so torført at fáa eina nøktandi semju við bretar, hví vit tá ikki bara fara til Haag'

Nú er tað so, at tá tú byrjar upp á eina process, so trýr ein upp á, at partarnir kunnu semjast um eitt mark. Vit hava jú góðar royndir frá øðrum marknaásetingum. Vit høvdu ikki trupulleikar við at finna sjómarkið millum Ísland og Føroyar, heldur ikki millum Noreg og Føroyar, og millum Føroyar og Bretland er ein grá leið, men tær stóru linjurnar høvdu vit heldur ikki teir stóru trupulleikarnar við. So frá byrjan av hava vit hildið, at samráðingarnar bara skuldu vera um ta gráu leiðina, men sum samráðingarnar ganga, so sær ein, at tað nú verða onnur áhugamál, sum gera, at krøvini verða sterkari enn tey hava verið.

### Sleppa ikki landssynningshorninum

*Heldur tú tað er kunnleikin hjá bretum til møguliga olju á føroyska landgrunninum, at teir eru komnir við so víðgongdum krøvum?*

Tað er ilt at meta um. Men teir hava arbeitt í oljuídnaðinum í mong ár, og hann hevur eisini arbeitt upp at okkara fiskimarki, so ein kann gita sær, at bretar vita meira um útjaðaran av okkara undirgrund, enn vit vita. Men sum tíðin líður og vit fáa úrslitið av seismisku kanningunum, so fáa vit eisini innlit í, hvussu vónirnar eru til tey ymsu økini, eisini tey øki, sum ósemja er um.

Løgmaður vísir á, at landssynningshornið á tí føroysku undirgrundini vísir seg at vera tað mest áhugaverda. Tað er hetta, sum størst áhugi er fyri frá bretskari síðu undir samráðingunum.

*-Og tað vilja føroyingar trygdugt sleppa?*

Tað vilja vit als ikki sleppa sigur Edmund Joensen, løgmaður.

**jan**




*Pílurin vísir okkum landssynningshornið á føroyska landgrunninum, sum bretar eru úti eftir men sum teir ikki fáa sambært løgmann. mynd jan*

BT palletvognar



Søla, eykalutir og tænasta!

Eru á goymslu.

Kaj Andreasen Pf.

Kingran 5 Hoyvik Tlf 15600